## DAGSINS MEINING

# Valdagurin

So upprann dagurin, har krossurin skal setast. Valstríðið hevur verið merkt av lýsingum og øðrum í størri mun, enn undanfarin val. Um hetta er gott ella ikki, má veljarin sjálvur meta um. Onkur hevur kallað tað ein basar, og er tað møguligt, at viðkomandi hevur rætt. Summir flokkar hava litfagrar plakatir, og onnur gagna ílatin sum blómur, men soleiðis eru flokkar nú einaferð so ymiskir, og keðiligt hevði verið, um allir vóru líka.

Valstríðið hevur eisini verið merkt av undarligum pástandum, har ávísir flokkar hava ført seg fram uppá, at hinir fara at tøma landskassan. Slíkt má sigast at vera óseriøst, og boðar ikki frá góðum, tá samstarvast skal eftir valið.

Vælferðin er ovast a breddanum til hetta valið, og má ein konstruktiv andstøða hava heiðurin av tí. Her hugsa vit serliga um Javnaðarflokkin. Munurin til hetta valið er, at summir kalla tað ein "rætt" og siga harvið, at betringar gerast ókeypis. Hetta má sigast at verða átaluvert og er yvirbjóðing uttan ábyrgd. At lova í eyst og vest, uttan at ítøkiliggera síni lyfti og bert kalla tað ein rætt, er ov væl sloppið - serliga tá ein ákærir mótstøðumenn fyri at vilja tøma landskassan. Forkláringsproblemið hjá samgonguni gerst uppaftur størri, tá man hyggur at vantandi úrslitunum í hesum valskeiðnum, Tað kann verða, at játtanin til almanna og heilsuøkið er økt, men so má skommin sigast at verða dult, tí ikki nokk við, at tænastan til borgaran ikki er betrað, so betalir borgarin eisini meir fyri hesa somu vánaligu tænastu. Tað kann ikki góðtakast.

Tað skal verða okkara vón at gjøgnumgangadi orðið í komandi tingsetu verður semja. Sitandi samgonga hevur ligið í ósemju við alt og øll ikki minst innanhýsis. Man kom ikki til nakra semju við danir og ei heldur við andstøuna. Tá tað kemur til almenna arbeiðsmarknaðin, hava ongantíð verið so nógvar ósemjur sum undir sitandi samgongu.

Løgmaður tosaði aftur um breiðu semjuna á valfundinum í Norðurlandahúnsium sunnukvøldið. Tað skal verða okkara vón, at hetta av samgonguni nokkso slitna hugtak verður veruligt, soleiðis at 3 stórir flokkar finna saman um eina hóvliga sjálvbjargnistilgond, ið ein stórur meiriluti av fólkinum tekur undir við.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat feilar teimum?

**Randi í Jógvanstovu**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Teir hava nú í fýra heili og haldig ár gabbað og møsnað um sítt fullveldi, og teir hava fingið tey somu boðini hvørja ferð frá danskarinum: "Tá tit vilja sleppa av við okkum er bara at fara." Men teir hava ikki tikið av, hví? Tí tað sokallaða "fullveldi", teir møsna um, er treytað av, at danir gjalda tað.

Flogvøllurin er eitt dømi, teir vilja hava hann, men danskarir skullu gera hann "upp to date" áðrenn teir vilja eiga hann.

Danir eru tað teir eru, men kúbýttir eru teir ikki.

Tá tú flytir heimanífrá, tekur tú eisini títt vaskitoy við tær. So leingi tú ert partur av húsarhaldinum, stendur tær frítt at gera brúk av teimum fasilitetum, húsarhaldið nú einaferð hevður. Tá tú sigur "Farvell og takk" forvanta tey gomlu sjálvsagt, at tú ert somikið at tær komin, at tú hevur ikki brúk fyri teimum longur. Soleiðis er tað "veruliga lívið" bara.

Javnaðarflokkurin hevur svarið uppá tær ríkisrættarligu spurningarnir, innan fyri ríkisfelagskapin. Tit lata ikki hånt um vælferðina og sleppa ikki teimum eldru og veiku uppá fjall til frama fyri fullveldi. At føroyingar er ein tjóð og eitt fólk, nýtist okkum ikki danskarir at siga okkum.

Tú sum ynskir: Samhaldsfesti - sjálvbjargni og sjálvstýri vel JAVNAÐARFLOKKIN.

# … og tú skalt prísa Mær!

**Absalon Áargarð**
*Hoyvík, 25. apríl 2002*



Í valstríðnum havi eg hoyrt fleiri politikarar siga, at tað eru føroyingar sjálvir, sum hava arbeitt seg úr tí sváru kreppu, sum landið var í miðskeiðis í 90'unum. Tað verður eisini sagt, at føroyingar framyvir skulu liva av tí, sum føroyingar sjálvir kunnu skapa.

Í Sálmi 50:15 stendur: "*… kalla á Meg, tann dag tú ert í neyð - Eg skal bjarga tær, og tú skalt prísa Mær!*". Í kreppuni vóru tað nógvir føroyingar, sum gjørdu júst hetta: teir kallaðu á Harran, og Harrin helt orð. Hann bjargaði okkara landi úr neyðini við at fiskurin kom aftur, fiskaprísirnir fóru upp í gjøgn og oljuprísirnir fóru (eina tíð í øllum førum) niður í botn. Einki av hesum høvdu vit føroyingar nakra sum helst ávirkan á.

Úrslitið gjørdist, at landið hevur fótað sær aftur, men latið okkum nú ikki gloyma seinasta part av versinum úr Sálmunum: "*… og tú skalt prísa Mær*". Latið okkum geva Harranum tað prís og tann heiður, sum einans Hann hevur uppibori.

Og latið okkum síðani við dirvi gagnnýta tað, sum Harrin gevur okkum, so skilagott og hegnisliga, sum vit duga.

# Hví skal Atlantic Airways privatiserast

**Frank Davidsen**



Og hvar var áhugin og viljin hjá Sambandsflokkinum at bjarga Atlantic, tá ið okkara flogfelag var í djúpari fíggjarligari kreppu.

Tað kvøldið í 1992, tá altavgerandi uppskotið varð borið niðan úr fíggjarnevndini, har atkvøðast skuldi um Atlantic Airways skuldi bjargast ella fara í likivitatión, rýmdu – minnist meg rætt – øll Sambandsumboðini út úr tingsalinum.

So um tað stóð til Sambandsflokkin, so var einki føroyskt flogfelag í dag, tí er tað ikki so lítið margháttligt at teir í dag gjarna vilja privatisera tað felag, sum flokkur teirra ongan stuðul gav, tá ið á stóð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VALGREINAR

# Hví ikki byrja 1. meidagshaldið longu valdagin?

**Jóannes Eidesgaard**
*formaður Javnaðarfloksins*



Verkafólk hava ein søguligan møguleika hesaferð at byrja altjóða arbeiðaradagin longu dagin fyri - nevniliga sjálvan valdagin. Tí fyri fyrstu ferð í mong Harrans ár hevur ein politiskur flokkur lagt eina ítøkiliga valskrá fram, sum beinleiðis er ætlað verkafólki. Ætlað teimum, sum fyri tímaløn bert hava sínar hendur á at líta.

Javnaðarflokkurin vil í komandi valskeiði syrgja fyri, at tímalønt fáa greið setunarviðuskifti, so sum allir aðrir starvsbólkar í samfelagnum hava. Ein tímaløntur skal frá fyrsta arbeiðsdegi hava at vita, hvørji rættindi og hvørjar skyldur, hann eigur. Løn, arbeiðstíð, uppsagnartíð, frítíðarviðurskifti o.l.

Javnaðarflokkurin vil í komandi valskeiði syrgja fyri, at øll tímalønt skulu eiga rætt til arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Hetta hevur verið eitt tilboð í okkara grannalondum í mong ár, meðan vit, sum fremt av øllum fáast við matvøruframleiðslu, als ongar slíkar útbúgvingar hava. Hetta kunnu hvørki vinnan, verkafólk ella myndugleikar liva við. Hví skal konan, sum ár eftir ár sker kílar ikki hava eina útbúgving um ta framleiðslu, hon er so týðandi partur av? Javnaðarflokkurin vil í samstarvi við vinnuna og fakrørsluna taka stig til slíkar útbúgvingar, sum verða styttri skeið við fullum lønarendurgjaldi.

Í triðja lagi vil Javnaðarflokkurin í komandi valskeiði syrgja fyri at fáa bøtt munandi um arbeiðsumhvørvið bæði á sjógvi og á landi. Hetta skal m.a. gerast við einum styrktum Arbeiðseftirliti og einari virknari deild fyri Arbeiðsmedisin.

Okkurt av hesum málum hava vit lagt fram á seinasta valskeiði, men tó uttan at hava fingið undirtøku frá sitandi samgongu. Men vit hava eina sterka trúgv upá, at hetta ikki verður so í einari komandi samgongu.

So góðu verkafólk, hví ikki gera valdagin til ein rættiligan arbeiðaradag, har júst tykkara viðurskifti fáa innivist í politiska arbeiðinum komandi fýra árini? Tað kunnu tit gera við at stuðla Javnaðarflokkinum, sum nú stendur púra einsamallur sum flokkurin hjá verkafólkinum.

Besta gávan til arbeiðaradagin 1. mei er ein sterkur Javnaðarflokkur á Føroya Løgting 30. apríl. Tá fáa vit ein góðan 1. mei.

Gott val.

# Frælsi føroyinga

**Kristoffur Gaardlykke**
*Valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Hvat er frælsi? Ja, hetta er ivaleyst eitt hugtak, vit øll uppfata ymiskt. Sambandsmenn halda, at frælsi er at vera í ríkisfelagsskapi við danir, tjóðveldismenn halda, at frælsi hava vit einans, um vit gerast ein sjálvstøðug tjóð. Men er yvirhøvur neyðugt at knýta frælsi saman við loysing/samband?

Nei. Vit halda ikki at frælsi hoyrir saman við hesum orðaskvaldrinum um loysing/samband. Frælsi er eftir mínari meining nakað heilt annað. At vera frælsur merkir, at ein hevur somu møguleikar óansæð fíggjarligu støðuna. At ein hevur somu rættindi, sjálvt um ein er flakakvinna, útróðrarmaður ella stjóri.

Vit vilja ikki hava eitt samfelag, har reiðarin fær betri sømdir, enn fiskimaðurin. Vit vilja ikki hava eitt samfelag, har vanligi verkamaðurin hevur ein minni leiklut, enn stjórin. Vit vilja ikki hava eitt klassasamfelag! Vit skulu øll virka saman fyri einum betri samfelag, har pláss er fyri øllum!

Vel tí flokkin, sum verjir og virkar fyri frælsinum hjá einstaklinginum!

# Skúlin fyri øll

**Eyðun Elttør**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðoyggjum*



"Skúlin fyri øll!" er eitt gott og positivt hugtak, ið stendur sum eitt navnaskelti fyri fólkaskúla okkara, og vit kunnu øll vera fegin um, at so er.

Men tað er nú einaferð altíð lættari at siga og skriva, hvussu viðurskiftini eiga at vera - væl truplari at ásanna, at enn liggur mangt á láni, um skúlakarmurin skal rúma øllum í framtíðini. Tí eingin má vera í iva um, at skúlin eigur at vera eitt gott stað at vera í bæði hjá børnum og lærarum.

Vit eiga at stremba eftir at fáa ein góðan skúla við hollari grundútbúgving, har trivnaður og menning eru í hásæti.

Skúlin er jú ein hornasteinur í samfelag okkara - ungdómurin sjálv framtíðin - tí gevur ein góður fólkaskúli eitt gott og sunt samfelag!

Vit eiga at leggja alla menning í børnini. Fólkaskúlin skal jú vera ein góð barlast til víðari útbúgvingar og virksemi í samfelagnum.

Skúlin skal somuleiðis vera ein góður vitanarberi, ið veitir ungdóminum gott kjølfesti at taka við øllum avbjóðingum í okkara framtíðar samfelag.

Vit eiga at veita fólkaskúlanum bestu sømdir - ikki vera afturhildandi, tá ið tað snýr seg um at játta neyðuga peningin. Hetta er treytin fyri, at skúlin sum mentanardepil fær virkað frítt innan teir lógarkarmar, ið ásettir eru.

Vit hava skyldu at hava ein tíðarhóskandi og dagførdan skúla, so tað til eina og hvørja tíð verður rúm fyri øllum!

Fáur man vera í iva, tá ið eg sigi, at ein góður og tryggur barna- og ungdómsskúli er sjálvur grundvøllurin, børn okkara kunnu byggja lívsvónir sínar á.

Á henda hátt gerast vit eisini før fyri at knýta saman ungdóm og samfelag.

Tey ungu, børnini og tey, ið starvast innan skúlaverkið, eiga at virka og halda til í einum sunnum fólkaskúla, sum hevur víðar skúlakarmar - annars viknar aftur tað bjarta aðalmálið, har sagt verður: "Skúlin fyri øll!"

Tí eiga orðini at vera púra greið:

"Ein góður fólkaskúli leggur lunnar undir eitt sterkt samfelag."

# Vit hava hugsjónir og tað gevur úrslit!!

**Eyðgunn Samuelsen**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum*



Hetta valið snýr seg ikki bert um loysing ella samband, tað snýr seg so sanniliga eisini um hugsjónir: hvat er tað fyri eitt samfelag vit ynskja !!

Vilja tit hava eitt samfelag har felagsskapurin millum okkum menniskju er í hásæti og hond verður tikin um tey veiku, tey sjúku og tey gomlu í okkara samfelag. Eitt samfelag har vit seta okkum sum mál, at samfelagi er ikki nóg gott fyrr enn tey veiku hava eitt ríkt lív

ella

Vilja tit hava eitt samfelag har tað einasta ið telur er um okkara land hevur fullveldi og annars valdar hugsjónarloysi ?

Mánadag sigur Tjóðveldisflokkurin, at tey ið hava ráð at vera heima hjá sínum børnum eiga at fáa samsýning fyri hetta samstundis sum 100 børn hjá foreldrum ið ikki hava ráð til slíkt standa á bíðilista. Mikudag sigur sami flokkur, nei hatta meintu vit ikki !!

Vit í Javnaðarflokkinum siga tað sama óansæð hvør dagur í vikuni tað er og óansæð hvar vit eru stødd. Øll børn skulu hava rætt til ansing og ikki bara tað, tey skulu hava dygdargóð og mennandi tilboð. Foreldur (ikki bara mamman) skulu hava 1 ára barnsburðarfarloyvi og systskin skulu fáa avsláttur á dagstovnum.

Ikki bara vita vit hvat vit vilja, vit gera eisini nakað við tað !! Síðan í juli 2000 hava vit útvega 122 nýggj ansingarpláss í Klaksvík og minka bíðilistan við 2/3 og umleið 60 pláss koma aftrat í ár og tað er ein vøkstur á yvir 100 % !! Og verið vís í at vit gevast ikki fyrr enn málið er rokkið - ansingartrygd til øll børn.

Ein dag sigur Tjóðveldisflokkurin hugsjónir eru ikki til longur, dagin eftir eru tey høgravend og sama dag er onkur teirra uttast til vinstru. Sannleikin er at tey hava ongar hugsjónir !!

Okkarar hugsjón er frá fyrst í øldini og hon er kjølfest í øllum norðanlondum og hon er tað samhaldsfasta vælferðarsamfelagi sum alla farnu øld hevur fingið norðanlond at skara framúr í øllum heiminum.

Fólkaflokkurin lovaði tykkum, at teir vildu arbeiða fyri at bøta um korðini hjá fólki við breki.

Javnaðarflokkurin er ítøkiligur, vit siga í minsta lagi 50 vard størv og 30 nýggj búpláss til fólk við brekið. Í okkara hugsjón hava øll rætt til eitt virkið lív !!

Hevur tú sama dreym sum vit, so ivast tú ikki valdagin !!

Eydgunn@post.olivant.fo

# Til allar suðuroyingar!

**Finnleif Guttesen**
*sambandsvalevni i Suðuroy*



Suðuroyggin er líka avbyrgd í dag, sum allar Føroyar verða tað, um vit fáa loysing.

Skal suðuroyggin ikki framvegis vera tann gloymda oyggin, er alneyðugt við einum sterkum Sambandsflokki.